Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Bygningurin hjá Sjóvinnustýrinum

Spurningar:

1. Hvat kostar bygningurin hjá Sjóvinnustýrinum, nú hann er liðugur?
2. Hvør er fermetrakostnaðurin á bygninginum alt íroknað uttan ognan av lendi, nú hann er liðugur?
3. Hvussu er fíggjarliga býtið millum handverkaraútreiðslur, ráðgeving, ognan av lendi og annað?
4. Hvussu var byggingin skipað?
5. Hvussu er mann nøgdur við úrslitið, nú bygningurin er liðugur?
6. Hvørjar orsakir metir mann vera til, at byggingin hevur gingið, sum hon hevur?

Viðmerkingar:
Í 2021 samtykti Løgtingið, at upp til 30 mió. kr. kundu brúkast til umsitingarbygning í Miðvági til Sjóvinnustýrið.
Fyri nøkrum døgum síðan varð lykilin til bygningin handaður Sjóvinnustýrinum, og tí hevði verið áhugavert at vitað, hvussu hendan verkætlanin hevur gingið – eisini havandi í huga avbjóðingarnar, sum í fleiri førum hava verið í samband við bygging av almennum bygningum seinastu árini.

Á Løgtingi, 23. november 2023

Eirikur í Jákupsstovu